**Námsætlan**

# Týskt

## C-stig – A-stig

## Viðmerkingar

- Partar av innihaldinum í áður galdandi námsætlanum eru fluttir í støðisnámsætlanina og aðrir partar í tilhoyrandi leiðbeiningar.

## Tilhoyrandi skjøl

- Støðisnámsætlan
- Leiðbeining – týskt C-stig
- Leiðbeining – týskt B-stig
- Leiðbeining – týskt A-stig

# 1. Samleiki

Fremmandamál eru portur út í heim og gera okkum før at koma í samband við onnur menniskju, lond og mentanir og at skilja, hvussu onnur búleikast og hugsa. Fremmandamál geva okkum fjøltáttaðar málførleikar og innlit í aðrar mentanir, sum eru týðandi førleikar í altjóða samvinnu og samstarvi um samfelagslig, handilslig og mentanarlig viðurskifti. Kunnleiki til fremmandamál og fremmandar mentanir vekir og fremur tolsemi. Kunnleiki til fremmandamál gevur okkum eisini innlit í okkara egna mál eins væl og onnur mál, alheimsbókmentir, vísindi, fagrar listir og søgu og ger okkum soleiðis meira tilvitað um egnan samleika.

Týskt er eitt av høvuðsmálunum í Evropa og er eitt ríkt mentanarmál við søguligum rótum og dýrgripum í bókmentum og list umframt týðandi frambrot í vísindum. Týskt er næststørsta vísindamál í heiminum.

At læra fremmandamál byggir á royndir og vitan úr móðurmálinum og øðrum fremmandamálum, sum longu eru tilognað í og uttan fyri skúlan. Føroyskt og týskt eru bendingarmál, og tí er natúrligt at bera málini saman í undirvísingini og soleiðis styrkja málsligu tilvitanina hjá nemingunum bæði viðvíkjandi móðurmálinum og týskum. Dentur verður lagdur á at undirvísa í týskum máli, mentan, søgu og samfelagsviðurskiftum.

# 2. Endamál

Undirvísingin í týskum hevur til endamáls, at næmingarnir:

- ogna sær týskt mál sum virkið amboð og samskiftismiðil
- menna málsliga tilvitan og kunnleika til týskt mál
- menna lesiførleikar og skriviførleikar í týskum
- ogna sær førleikar at skilja, umrøða og viðgera tekstir á týskum
- fáa kunnleika til mentanar- og samfelagsviðurskifti í londum og økjum, har týskt verður talað og nýtt, og innlit í millumtjóða sambond
- ogna sær vitan um málsligt og mentanarligt fjølbroytni
- fáa innlit í, hvussu mentan, samleiki, siðir og virðir eru tongd at okkara fatan av heiminum.

# 3. Kjarnaøki

Lærugreinin týskt hevur fýra kjarnaøki, ið eru tey somu frá lægsta til hægsta stig. Økini umskarast og virka fyri ein stóran part saman í undirvísingini.

- Talaða málið

- Skrivaða málið
- Málkunnleiki
- Mentan og samfelag

## Talaða málið

Kjarnaøkið *talaða málið* snýr seg í týskum um, at næmingurin mennir sínar samskiftisførleikar í týskum. Hetta kjarnaøkið fevnir tí um at lurta, tosa og leggja fram í ymiskum felagsligum høpi. Í undirvísingini skal tí hugt verða at ymiskum samskiftissnildum og ymiskum lurti- og talihættum. Umráðandi er, at tosað verður á týskum máli í størst møguligan mun í undirvísingini.

## Skrivaða málið

Kjarnaøkið *skrivaða málið* snýr seg um, at næmingurin mennir sínar lesi- og skriviførleikar í týskum. Hetta kjarnaøkið fevnir um at lesa, fata og skriva við støði í ymiskum tekstsløgum úr týskmæltum økjum. Í hesum sambandi verður arbeitt við ymiskum lurti- og lesiháttum og hóskandi hjálparmiðlum. Kjarnaøkið *skrivaða málið* snýr seg sostatt eisini um stigvíst at víðka um orðfeingið, umframt viðgerð av tekstum, og er á tann hátt eisini við til at stuðla upp undir talaða málið.

## Málkunnleiki

Kjarnaøkið *málkunnleiki* snýr seg um, at næmingurin gjøgnum tekstir og samskifti fær innlit í og lærir seg grundleggjandi týskar ljóðreglur, bendingar og setningsbygnað, umframt at komið verður inn á semantikk í fremmandamálsligum høpi. Grundleggjandi kunnleiki til ein málbygnað styrkir samskiftisførleikan og mennir málfatan næminganna sum heild.

## Mentan og samfelag

Kjarnaøkið *mentan og samfelag* snýr seg um, at næmingurin fær eina tilvitaða fatan av mentan og samfelagi í londunum, har týskt er høvuðsmál. Í hesum kjarnaøki verður sostatt arbeitt við hóskandi evnum, sum eyðkenna mentan og samfelag í týskmæltum londum og økjum. Undirvíst verður tí í einum breiðum úrvali av tekstum á ymiskum torleikastigum frá nýggjari og eldri tíð um almenn, mentanarlig og samfelagslig evni. Týðandi mentanarlig og samfelagslig viðurskifti í týskum máløkjum verða tikin við upp í undirvísingina.

# 4. Faklig førleikamál

Á miðnámi eru endalig mál fyri C-stig, B-stig og A-stig.

## C-stig – framhaldsmál – faklig førleikamál

Málið við undirvísingini er, at næmingurin dugir:

- at lurta eftir og skilja høvuðsinnihaldið í týðiliga talaðum einfaldum týskum máli um kend evni, miðlað gjøgnum ymiskar miðlar
- at lesa og í høvuðsheitum skilja ymisk sløg av ótillagaðum týskum tekstum á einfaldum máli
- at samskifta um kend evni á einfaldum og samanhangandi týskum, herímillum at samskifta í gerandisstøðum
- at leggja fram og greiða frá kendum evnum á einfaldum og samanhangandi týskum
- at orða seg skrivliga á einfaldum og samanhangandi týskum um kend evni
- at nýta orðabøkur og viðkomandi mállærubøkur
- at seta týskt í samband við føroyskt og onnur mál
- at skilja sosialar atferðarreglur í týskmæltum økjum
- at seta týskt í mentanarligan og søguligan samanhang.

## B-stig – byrjanarmál – faklig førleikamál

Málið við undirvísingini er, at næmingurin dugir:

- at lurta eftir og skilja høvuðsinnihaldið í týðiliga talaðum einfaldum týskum máli um kend evni, miðlað gjøgnum ymiskar miðlar
- at lesa og í høvuðsheitum skilja ymisk sløg av ótillagaðum týskum tekstum á einfaldum máli
- at samskifta um kend evni á einfaldum og samanhangandi týskum, herímillum at samskifta í gerandisstøðum
- at leggja fram og greiða frá kendum evnum á einfaldum og samanhangandi týskum
- at orða seg skrivliga á einfaldum og samanhangandi týskum um kend evni
- at nýta orðabøkur og viðkomandi mállærubøkur
- at seta týskt í samband við føroyskt og onnur mál
- at skilja sosialar atferðarreglur í týskmæltum økjum
- at seta týskt í mentanarligan og søguligan samanhang.

# B-stig – framhaldsmál – faklig førleikamál

Málið við undirvísingini er, at næmingurin dugir:

- at lurta eftir og skilja høvuðsinnihaldið í týðiliga talaðum týskum máli um kend evni, miðlað gjøgnum ymiskar miðlar
- at lesa og skilja ymisk sløg av ótillagaðum týskum tekstum úr ymiskum tekstsløgum
- at taka lut í samskifti og kjaki um kend evni og greiða frá ymsum sjónarmiðum á týðiligum og nøkulunda rættum týskum
- at leggja fram og greiða frá kendum evnum á týðiligum og nøkulunda rættum týskum, herímillum um mentan, søgu og samfelagsviðurskifti í týskmæltum økjum
- at orða seg skrivliga á einfaldum og samanhangandi týskum um kend evni
- at viðgera týskar tekstir úr ymiskum tekstsløgum og seta einstaka tekstin í frásjón
- at nýta orðabøkur og viðkomandi mállærubøkur
- grundleggjandi týskar ljóðreglur, bendingar og setningsbygnað
- at seta týskt í samband við føroyskt og onnur mál og nýta millummálsligu vitanina til at menna málið
- at skilja sosialar atferðarreglur í týskmæltum økjum.

# A-stig – byrjanarmál – faklig førleikamál

Málið við undirvísingini er, at næmingurin dugir:

- at lurta eftir og skilja høvuðsinnihaldið í týðiliga talaðum týskum máli um kend evni, miðlað gjøgnum ymiskar miðlar
- at lesa og skilja ymisk sløg av ótillagaðum týskum tekstum úr ymiskum tekstsløgum
- at taka virknan lut í samskifti um kend evni og greiða frá ymsum sjónarmiðum á týðiligum og nøkulunda rættum týskum
- at leggja fram og greiða frá kendum evnum á týðiligum og nøkulunda rættum týskum, herímillum um mentan, søgu og samfelagsviðurskifti í týskmæltum økjum
- at orða seg skrivliga á einfaldum og samanhangandi týskum um kend evni
- at viðgera týskar tekstir úr ymiskum tekstsløgum og seta einstaka tekstin í frásjón
- at nýta orðabøkur og viðkomandi mállærubøkur
- grundleggjandi týskar ljóðreglur, bendingar og setningsbygnað
- at seta týskt í samband við føroyskt og onnur mál og nýta millummálsligu vitanina til at menna málið
- at skilja sosialar atferðarreglur í týskmæltum økjum.

## A-stig – framhaldsmál – faklig førleikamál

Málið við undirvísingini er, at næmingurin dugir:

- at lurta eftir og skilja talað týskt mál um kend evni, miðlað gjøgnum ymiskar miðlar
- at lesa og skilja ymisk sløg av ótillagaðum gomlum og nýggjari týskum tekstum úr ymiskum tekstsløgum
- at taka virknan lut í samskifti og kjaki og greiða frá ymsum sjónarmiðum á týðiligum, samanhangandi og fjølbroyttum týskum
- at leggja fram á týskum um kend evni og týskar tekstir, herímillum at viðgera hesar og samanbera við aðrar tekstir við breiðum orðfeingi og nøkulunda rættum týskum máli og tónalagi
- at orða seg greitt og samanhangandi á skrivligum týskum við breiðum orðfeingi og nøkulunda rættum týskum
- at nýta orðabøkur og viðkomandi mállærubøkur
- at greina og lýsa týska mállæru og setningsbygnað á føroyskum máli
- at seta týskt í samband við føroyskt og onnur mál og nýta millummálsligu vitanina til at menna málið
- at skilja sosialar atferðarreglur í týskmæltum økjum
- at greiða frá á týskum um týdningarmiklar, útvaldar síður av mentan, søgu og samfelagsviðurskiftum í týskmæltum økjum.

# 5. Próvtøka

Næmingarnir fara til endaliga próvtøku á C-stigi, B-stigi og A-stigi á miðnámi.

## C-stig – framhaldsmál – próvtøka

### Próvtøkuháttur á C-stigi – framhaldsmál

Hildin verður ein munnlig próvtøka.

### Munnlig próvtøka á C-stigi – framhaldsmál

Próvhoyringin varir 20 minuttir, íroknað próvdøming. Fyrireikingartíðin er 40 minuttir, íroknað útflýggjan av tilfari og leiðbeining.

Próvhoyrt verður í ókendum tilfari, og tilfarið skal vera valt soleiðis, at tað í tema ella á annan hátt er knýtt at evnum, sum arbeitt hevur verið við í undirvísingini. Mynd kann vera partur av tilfarinum. Orðafrágreiðingar kunnu vera til serliga trupul orð. Próvtøkuspurningurin skal byrja við stuttari leiðbeining á týskum um, hvussu próvtakarin skal arbeiða við tilfarinum.

Munnliga próvtøkan er tvíbýtt:

1. Við støði í einum ókendum teksti á umleið ½ normalsíðu skal næmingurin lesa eitt brot upp á týskum. Brotið skal fevna um umleið 50 orð. Próvtakarin skal greitt fáa at vita, hvønn part talan er um. Próvhoyrarin setir hereftir spurningar á føroyskum til málslig og/ella innihaldslig viðurskifti, ið skulu lýsa próvtakarans fatan av teksti og málbygnaði.
2. Síðani er ein samrøða á týskum millum próvtakara og próvhoyrara um útflýggjaða tekstin, sum eisini verður settur í samband við viðgjørd evni. Próvtakarin innleiðir samrøðuna við eini stuttari framløgu á týskum um tekstin og evnið.

Allir hjálparmiðlar eru loyvdir, tó ikki umsetingarforrit, sum kunnu umseta heilar setningar úr einum máli í annað. Loyvt er heldur ikki at nýta vitlíki.

Ein normalsíða er 2400 tekn, íroknað millumrúm.

Sami próvtøkuspurningur kann í mesta lagi verða nýttur tvær ferðir í sama flokki/bólki.

### Dømingargrundarlag – munnlig próvtøka á C-stigi – framhaldsmál

Í dømingini verður dentur lagdur á, í hvønn mun próvtakarin lýkur faklig mál, sum eru sett í lærugreinini. Próvtakarin skal við støði í fakligari tilgongd sýna evni til sjálvstøðugt á týskum at leggja fram og viðgera tilfar við støði í einum próvtøkuspurningi. Próvtakarin skal vísa, at hann/hon dugir at taka fram týðandi tættir í tilfarinum og seta teir í samband við tættir í undirvísingini. Evnini at samskifta á týskum verða vektað hægst. Samanhangandi málburður á týskum er meira umráðandi enn lýtaloysi í smálutum.

Givið verður eitt próvtal við støði í einari heildarmeting av samlaða avriki próvtakarans.

## B-stig – byrjanarmál – próvtøka

### Próvtøkuháttur á B-stigi – byrjanarmál

Hildin verður ein munnlig próvtøka.

## Munnlig próvtøka á B-stigi – byrjanarmál

Próvhoyringin varir 30 minuttir, íroknað próvdøming. Fyrireikingartíðin er 60 minuttir, íroknað útflýggjan av tilfari og leiðbeining.

Próvhoyrt verður í ókendum tilfari, og tilfarið skal vera valt soleiðis, at tað í tema ella á annan hátt er knýtt at evnum, sum arbeitt hevur verið við í undirvísingini. Mynd kann vera partur av tilfarinum. Orðafrágreiðingar kunnu vera til serliga trupul orð. Próvtøkuspurningurin skal byrja við stuttari leiðbeining á týskum um, hvussu próvtakarin skal arbeiða við tilfarinum.

Munnliga próvtøkan er tvíbýtt:

1. Við støði í einum ókendum teksti á umleið ½-1 normalsíðu skal næmingurin lesa eitt brot upp á týskum. Brotið skal fevna um umleið 50 orð. Próvtakarin skal greitt fáa at vita, hvønn part talan er um. Próvhoyrarin setir hereftir spurningar á føroyskum til málslig og/ella innihaldslig viðurskifti, ið skulu lýsa próvtakarans fatan av teksti og málbygnaði.
2. Síðani er ein samrøða á týskum millum próvtakara og próvhoyrara um útflýggjaða tekstin, sum eisini verður settur í samband við viðgjørd evni. Próvtakarin innleiðir samrøðuna við eini stuttari framløgu á týskum um tekstin og evnið.

Allir hjálparmiðlar eru loyvdir, tó ikki umsetingarforrit, sum kunnu umseta heilar setningar úr einum máli í annað. Loyvt er heldur ikki at nýta vitlíki.

Ein normalsíða er 2400 tekn, íroknað millumrúm.

Sami próvtøkuspurningur kann í mesta lagi verða nýttur tvær ferðir í sama flokki/bólki.

## Dømingargrundarlag – munnlig próvtøka á B-stigi – byrjanarmál

Í dømingini verður dentur lagdur á, í hvønn mun próvtakarin lýkur faklig mál, sum eru sett í lærugreinini. Próvtakarin skal við støði í fakligari tilgongd sýna evni til sjálvstøðugt á týskum at leggja fram og viðgera tilfar við støði í einum próvtøkuspurningi. Próvtakarin skal vísa, at hann/hon dugir at taka fram týðandi tættir í tilfarinum og seta teir í samband við tættir í undirvísingini. Evnini at samskifta á týskum verða vektað hægst. Samanhangandi málburður á týskum er meira umráðandi enn lýtaloysi í smálutum.

Givið verður eitt próvtal við støði í einari heildarmeting av samlaða avriki próvtakarans.

# B-stig – framhaldsmál – próvtøka

## Próvtøkuháttur á B-stigi – framhaldsmál

Hildin verður ein munnlig próvtøka.

## Munnlig próvtøka á B-stigi – framhaldsmál

Próvhoyringin varir 30 minuttir, íroknað próvdøming. Fyrireikingartíðin er 60 minuttir, íroknað útflýggjan av tilfari og leiðbeining.

Próvhoyrt verður í ókendum tilfari, og tilfarið skal vera valt soleiðis, at tað í tema ella á annan hátt er knýtt at evnum, sum arbeitt hevur verið við í undirvísingini. Mynd kann vera partur av tilfarinum. Orðafrágreiðingar kunnu vera til serliga trupul orð. Próvtøkuspurningurin skal byrja við stuttari leiðbeining á týskum um, hvussu próvtakarin skal arbeiða við tilfarinum.

Munnliga próvtøkan er tvíbýtt:

1. Við støði í einum ókendum teksti á umleið 1-1½ normalsíðu skal næmingurin lesa eitt brot upp á týskum. Brotið skal fevna um umleið 70 orð. Próvtakarin skal greitt fáa at vita, hvønn part talan er um. Próvhoyrarin setir hereftir spurningar á føroyskum til málslig og/ella innihaldslig viðurskifti, ið skulu lýsa próvtakarans fatan av teksti og málbygnaði.
2. Síðani er ein samrøða á týskum millum próvtakara og próvhoyrara um útflýggjaða tekstin, sum eisini verður settur í samband við viðgjørd evni. Próvtakarin innleiðir samrøðuna við eini stuttari framløgu á týskum um tekstin og evnið.

Allir hjálparmiðlar eru loyvdir, tó ikki umsetingarforrit, sum kunnu umseta heilar setningar úr einum máli í annað. Loyvt er heldur ikki at nýta vitlíki.

Ein normalsíða er 2400 tekn, íroknað millumrúm.

Sami próvtøkuspurningur kann í mesta lagi verða nýttur tvær ferðir í sama flokki/bólki.

## Dømingargrundarlag – munnlig próvtøka á B-stigi – framhaldsmál

Í dømingini verður dentur lagdur á, í hvønn mun próvtakarin lýkur faklig mál, sum eru sett í lærugreinini. Próvtakarin skal við støði í fakligari tilgongd sýna evni til sjálvstøðugt á týskum at leggja fram og viðgera tilfar við støði í einum próvtøkuspurningi. Próvtakarin skal vísa, at hann/hon dugir at taka fram týðandi tættir í tilfarinum og seta teir í samband við tættir í undirvísingini. Evnini at samskifta á týskum verða vektað hægst. Samanhangandi málburður á týskum er meira umráðandi enn lýtaloysi í smálutum.

Givið verður eitt próvtal við støði í einari heildarmeting av samlaða avriki próvtakarans.

# A-stig – byrjanarmál – próvtøka

## Próvtøkuhættir á A-stigi – byrjanarmál

Hildnar verða ein skrivlig og ein munnlig próvtøka.

## Skrivlig próvtøka á A-stigi – byrjanarmál

Skrivliga próvtøkan varir 4½ tímar, og uppgávurnar í próvtøkuraðnum verða settar innan fyri kjarnaøkini í lærugreinini.

Skrivliga próvtøkan er tvíbýtt:

1. Fleiri smáar uppgávur um ein týskan tekst. Eingir hjálparmiðlar eru loyvdir. Uppgávan er í pappírsformi, og svarast skal við hond. Hesin parturin av próvtøkuni kann í mesta lagi vara 1½ tíma.
2. Próvtakarin skal skrivliga á týskum viðgera týskar tekstir. Einans sentralt ásettir hjálparmiðlar eru loyvdir. Uppgávan er í pappírsformi, og svarast skal við hond. Hesin parturin av próvtøkuni byrjar, tá fyrri parturin er innlatin.

## Dømingargrundarlag – skrivlig próvtøka á A-stigi – byrjanarmál

Í dømingini verður dentur lagdur á, í hvønn mun próvtakarin lýkur fakligu málini, sum eru sett í lærugreinini. Dentur verður lagdur á, at próvtakarin dugir at taka týdningarmestu tættirnar burtur úr tekstatilfarinum, at orða seg skrivliga á týskum og at skipa og leggja fram eitt innihald. Próvtakarin skal harumframt vera stinnur í formlæru og orðalagslæru og hava tamarhald á almennum orðatilfari og merkingarlæru.

Givið verður eitt próvtal við støði í einari heildarmeting av samlaða avriki próvtakarans.

## Munnlig próvtøka á A-stigi – byrjanarmál

Próvhoyringin varir 30 minuttir, íroknað próvdøming. Fyrireikingartíðin er 60 minuttir, íroknað útflýggjan av tilfari og leiðbeining.

Próvhoyrt verður í ókendum tilfari, og tilfarið skal vera valt soleiðis, at tað í tema ella á annan hátt er knýtt at evnum, sum arbeitt hevur verið við í undirvísingini. Mynd kann vera partur av tilfarinum. Orðafrágreiðingar kunnu vera til serliga trupul orð. Próvtøkuspurningurin skal byrja við stuttari leiðbeining á týskum um, hvussu próvtakarin skal arbeiða við tilfarinum.

Munnliga próvtøkan er tvíbýtt:

1. Við støði í einum ókendum teksti á umleið 1-1½ normalsíðu skal næmingurin lesa eitt brot upp á týskum. Brotið skal fevna um umleið 70 orð. Próvtakarin skal greitt fáa at vita, hvønn part talan er um. Próvhoyrarin setir hereftir spurningar á føroyskum til málslig og/ella innihaldslig viðurskifti, ið skulu lýsa próvtakarans fatan av teksti og málbygnaði.
2. Síðani er ein samrøða á týskum millum próvtakara og próvhoyrara um útflýggjaða tekstin, sum eisini verður settur í samband við viðgjørd evni. Próvtakarin innleiðir samrøðuna við eini stuttari framløgu á týskum um tekstin og evnið.

Allir hjálparmiðlar eru loyvdir, tó ikki umsetingarforrit, sum kunnu umseta heilar setningar úr einum máli í annað. Loyvt er heldur ikki at nýta vitlíki.

Ein normalsíða er 2400 tekn, íroknað millumrúm.

Sami próvtøkuspurningur kann í mesta lagi verða nýttur tvær ferðir í sama flokki/bólki.

### Dømingargrundarlag – munnlig próvtøka á A-stigi – byrjanarmál

Í dømingini verður dentur lagdur á, í hvønn mun próvtakarin lýkur faklig mál, sum eru sett í lærugreinini. Próvtakarin skal við støði í fakligari tilgongd sýna evni til sjálvstøðugt á týskum at leggja fram og viðgera tilfar við støði í einum próvtøkuspurningi. Próvtakarin skal vísa, at hann/hon dugir at taka fram týðandi tættir í tilfarinum og seta teir í samband við tættir í undirvísingini. Evnini at samskifta á týskum verða vektað hægst. Samanhangandi málburður á týskum er meira umráðandi enn lýtaloysi í smálutum.

Givið verður eitt próvtal við støði í einari heildarmeting av samlaða avriki próvtakarans.

## A-stig – framhaldsmál – próvtøka

### Próvtøkuhættir á A-stigi – framhaldsmál

Hildnar verða ein skrivlig og ein munnlig próvtøka.

### Skrivlig próvtøka á A-stigi – framhaldsmál

Skrivliga próvtøkan varir 5 tímar, og uppgávurnar í próvtøkuraðnum verða settar innan fyri kjarnaøkini í lærugreinini.

Skrivliga próvtøkan er tvíbýtt:

1. Fleiri smáar uppgávur um ein týskan tekst. Eingir hjálparmiðlar eru loyvdir. Uppgávan er í pappírsformi, og svarast skal við hond. Hesin parturin av próvtøkuni kann í mesta lagi vara 1½ tíma.

2. Próvtakarin skal skrivliga á týskum viðgera týskar tekstir. Einans sentralt ásettir hjálparmiðlar eru loyvdir. Uppgávan er í pappírsformi, og svarast skal við hond. Hesin parturin av próvtøkuni byrjar, tá fyrri parturin er innlatin.

## Dømingargrundarlag – skrivlig próvtøka á A-stigi – framhaldsmál

Í dømingini verður dentur lagdur á, í hvønn mun próvtakarin lýkur fakligu málini, sum eru sett í lærugreinini. Dentur verður lagdur á, at próvtakarin dugir at taka týdningarmestu tættirnar burtur úr tekstatilfarinum, at orða seg skrivliga á týskum og at skipa og leggja fram eitt innihald. Próvtakarin skal harumframt vera stinnur í formlæru og orðalagslæru og hava tamarhald á almennum orðatilfari og merkingarlæru.

Givið verður eitt próvtal við støði í einari heildarmeting av samlaða avriki próvtakarans.

## Munnlig próvtøka á A-stigi – framhaldsmál

Próvhoyringin varir 30 minuttir, íroknað próvdøming. Fyrireikingartíðin er 60 minuttir, íroknað útflýggjan av tilfari og leiðbeining.

Próvhoyrt verður í ókendum tilfari, og tilfarið skal vera valt soleiðis, at tað í tema ella á annan hátt er knýtt at evnum, sum arbeitt hevur verið við í undirvísingini. Mynd kann vera partur av tilfarinum. Orðafrágreiðingar kunnu vera til serliga trupul orð. Próvtøkuspurningurin skal byrja við stuttari leiðbeining á týskum um, hvussu próvtakarin skal arbeiða við tilfarinum.

Munnliga próvtøkan er tvíbýtt:

1. Við støði í einum ókendum teksti á umleið 1½-2 normalsíður skal næmingurin lesa eitt brot upp á týskum. Brotið skal fevna um umleið 70 orð. Próvtakarin skal greitt fáa at vita, hvønn part talan er um. Próvhoyrarin setir hereftir spurningar á føroyskum til málslig og/ella innihaldslig viðurskifti, ið skulu lýsa próvtakarans fatan av teksti og málbygnaði.
2. Síðani er ein samrøða á týskum millum próvtakara og próvhoyrara um útflýggjaða tekstin, sum eisini verður settur í samband við viðgjørd evni. Próvtakarin innleiðir samrøðuna við eini stuttari framløgu á týskum um tekstin og evnið.

Allir hjálparmiðlar eru loyvdir, tó ikki umsetingarforrit, sum kunnu umseta heilar setningar úr einum máli í annað. Loyvt er heldur ikki at nýta vitlíki.

Ein normalsíða er 2400 tekn, íroknað millumrúm.

Sami próvtøkuspurningur kann í mesta lagi verða nýttur tvær ferðir í sama flokki/bólki.

## Dømingargrundarlag – munnlig próvtøka á A-stigi – framhaldsmál

Í dømingini verður dentur lagdur á, í hvønn mun próvtakarin lýkur faklig mál, sum eru sett í lærugreinini. Próvtakarin skal við støði í fakligari tilgongd sýna evni til sjálvstøðugt á týskum at leggja fram og viðgera tilfar við støði í einum próvtøkuspurningi. Próvtakarin skal vísa, at hann/hon dugir at taka fram týðandi tættir í tilfarinum og seta teir í samband við tættir í undirvísingini. Evnini at samskifta á týskum verða vektað hægst. Samanhangandi málburður á týskum er meira umráðandi enn lýtaloysi í smálutum.

Givið verður eitt próvtal við støði í einari heildarmeting av samlaða avriki próvtakarans.